


**_Nr. 13_** **_29. juni 2014_** **_74. árg._**

# Hjá Gudi er ongin tíð

Ein professari og ein prestur hittust á eini veitslu, og av tí at teir ikki høvdu hitst fyrr, presenteraðu teir seg fyri hvørøðrum.

”Tað var áhugavert at hitta ein prest,” segði professarin. ”Sum prestur kunnu tygum kanska svara mær einum spurningi, sum eg ofta havi hugsað um: Hvussu kann Gud hava stundir at hava skil á hvørjum einstøkum menniskja í øllum meldrinum av fleiri milliardum av menniskjum á jørðini?”

”Hatta er ein sera einfaldur spurningur, sum tygum seta, harra professari,” svaraði presturin. „Hjá Gudi er ongin tíð. Hjá Gudi er ævinleikin!”

Nei, hjá Gudi er onki, sum eitur tíð, har er ævinleikin. Gud skapti tíðina, men sjálvur er hann ikki heftur av tíð og rúmd, soleiðis sum vit menniskju eru. Tíðin avmarkar okkara møguleikar at halda skil á øllum – og eisini møguleikarnar at vera nakað fyri onnur. Men Gud hevur ikki slíkar avmarkingar í síni umsorgan fyri okkum og í møguleikunum at stýra heiminum. Hann kann halda skil á hvørjum einstøkum lítlum mannabarni á jørðini og hava umsorgan fyri tí, hvar tað so er statt, og hvørjum umstøðum, tað júst nú er statt í.

Dávid var komin júst til hesa somu sannroynd og ber hana fram í Sálmi 139 ørindini 2-6:

*Hvørt eg siti ella standi, tú tað veitst,*
*langt burtur tín ætlan er mær kunn.*
*Hvørt eg gangi ella liggi, tú tað kannar,*
*tú veitst um vegir mínar allar.*
*Áðrenn orðið er mær á míni tungu,*
*tú, Harri, tað kennir til fulnar.*

*Fyri aftan, fyri framman ert tú um meg,*
*og hond tína hevur á meg tú lagt.*
*Tað er mær ov undurfult at skilja,*
*ov høgt, eg eri ei fyri tí førur.*

Nei, skilja tað kunnu vit ikki, um vit so eru ein Dávid ella ein væl lærdur professari ella bara eitt heilt vanligt menniskja. Vit skilja tað ikki við viti okkara, tí eisini tað er rættiliga avmarkað.

Men vit sleppa at taka henda boðskapin til okkara, nú ið vit longu eru komin hálva leið inn í 2014, at Gud ikki er avmarkaður í sínum møguleikum at taka sær av hvørjum einstøkum, hvar vit so eru stødd á lívsleiðini. Vit mugu taka henda boðskapin til okkara, bæði við hugsanini um okkum sjálvi og um tey, sum vit hava ábyrgd av her í lívinum. Vit eru øll í Guds varðveitslu. Og hjá honum er ongin tíð. Gud hevur ein heilan ævinleika, og alt valdið er í hansara hondum, tá ið hann ætlar at fremja tað, sum hann sær er okkum at gagni!

*O, undur størsta, gleði mesta,*
*at Gud, sum valdar rúmi tíð,*
*mær, foni lítlum, gav hitt besta,*
*gav boðskapin, tey orð so blíð:*
*"Tú ert mítt barn, eg faðir tín,*
*um ævir allar ert tú mín!"*

# Ein endurnýggjanar Gud

Gud er ein endurnýggjanar Gud. Hann vil hava okkum út úr fortíðini og inn í framtíðina. Tú hugsar kanska um børn tíni, sum ikki ganga Harrans vegir. Tú biður; men enn er einki hent. Tey ganga enn úti í "oyðimørkini", í tí turra lendinum. Halt tú treystliga á í bønini, tí Harrin lovar tær í Jes. 43,19: "Sí, nú skapi eg nýggjar lutir, tað sprettur longu, síggja tit tað ikki? Gjøgnum oyðimørkina leggi eg veg og leiði áir yvir reyn."

Ættin hjá tær skal blíva frelst, so vist sum tú ikki gevst, men herjar á í bønini. Í Áps. 2,17 fáa vit hetta lyftið: "Og tað skal verða á hinum evstu døgum, sigur Gud, tá skal eg hella út av anda mínum yvir alt hold; og synir tykkara og døtur tykkara skulu profetera, og ungmenni tykkara skulu síggja sjónir, og gamlamenni tykkara skulu droyma dreymar." Hetta er himmalsins Gud, sum talar, og hann

sigur, at synir tykkara og døtur tykkara skulu profetera, og ungmenni tykkara skulu síggja sjónir.

Tú skalt fáa tey ungu í slektini við, um tú staðiliga heldur saman hendur fyri teimum. Tú sigur kanska: “Míni eru so langt úti, har er eingin vón.” Hevur tú gloymt, hvønn tú vendir tær til í bønini? Í Job 42,2 lesa vit: “Eg veit, at tú megnar alt, og at einki er tær ógjørligt!”

Tað kundi væl borið á, at tú fært eina vissu í hjarta títt, at nú fara tey at venda við, áðrenn tað veruliga hendir. Tí í Jóh. 16,13 stendur: “Men tá ið hann kemur, sannleikans andi, tá skal hann vegleiða tykkum til allan sannleikan; tí at hann skal tala av sær sjálvum, men hvat sum hann hoyrir, skal hann tala, og tað, sum skal koma, skal hann kunngera tykkum.” Tað, sum skal koma einaferð í framtíðini, skal hann kunngera tykkum. Hann skal leggja vissuna inn í títt hjarta. Gud signi teg at vera trúføst í bønini.

*Effie Campbell* umsetti.

# Einglar

*„Eru teir ikki allir (einglarnir) tænandi andar, sum verða útsendir til hjálpar teirra vegna, sum skulu arva frelsu?“*

*Hebr. 1,14.*

Tú hevur einglar uttan um teg. Teir somu ljósins skarar, sum vardu teg, tá ið tú vart barn, fylgja tær enn, nú ið tú ert tilkomin. Gud hevur sent teir at tæna og hjálpa tær.

Einglarnir vaka yvir tær, tá ið tú svevur. Teir eru tær við lið, tá ið tú arbeiðir. Teir fylgja tær, tá ið tú gongur úti. Teir verja teg, tá ið tú ert í vanda. Teir ávara teg, tá ið tú verður freistað(ur). Teir samgleðast við tær, tá ið tú sigrar.

Tú varnast ikki, tá ið einglarnir eru um teg. Tú sært teir heldur ikki, og ikki skalt tú biðja til teirra. Heldur ikki skalt tú royna at fáa samband við teir. Men so satt, sum tú livir lív títt í Kristi, eru einglarnir uttan um teg. Teir gera gerning sín, tó at tú ikki sært teir, og tó at tú ikki takkar teimum.

Og vita skalt tú eisini í dag: tú gongur ígjøgnum ein heim, ið er fullur av vanda og synd – men einglar eru altíð uttan um teg. Vóru teir ikki, so hevði lív títt verið øðrvísi. Uttan um teg er altíð okkurt gott og signað – okkurt, sum altíð vil tær væl: barnaeinglar tínir.

Eingil tín varðveitir teg frá sorg og vanda – hann leiðir fót tín í dag.

*t.* týddi.

# Ert tú høgra- ella vinstrasinnaður

Emanuel Minos

Einaferð, tá ið eg var í Svøríki og talaði, kom ein blaðmaður har. Hann vildi hava eina samrøðu við meg. Eg ræðist tíðindafólk, tí tey eru so snúin og listinlærd og hava altíð eina dulda ætlan við sínum spurningum. Ein myndamaður fylgdist við honum. Blaðmaðurin smíltist og var so ógvuliga blíður; men jú blíðari hann var, jú verri ræddist eg hann og var á varðhaldi.

"Nær talaðu tygum fyrstu ferð, Minos?" spurdi hann.

"Tá eg var 5 ár."

"Og nær blivu tygum so andsdoyptur?"

"Tá eg var 7 ár."

Myndamaðurin var farin, og blaðmaðurin gjørdi seg eisini til at fara. Hann hevði bara spurt vanligar spurningar, so eg helt, at eg hevði gjørt honum órætt. Hann legði hondina á handtakið og skuldi lata hurðina upp; men tá snaraði hann sær brádliga á og spurdi: "Minos, eru tygum høgra- ella vinstrasinnaður?"

"So, nú kom tað! Nú leyp hann á við sínum listinlærdu spurningum," hugsaði eg. Eg suffaði upp til Harrans um hjálp, tí eg visti als ikki, hvat ið eg skuldi svara hesum manni. Svarið kom beinanvegin.

"Eg eri Golgata-sinnaður!" segði eg.

"Ha?" segði hann og gapaði við av bilsni.

"Ja, tú veitst, at á Golgata hekk Jesus á tí mittasta krossinum. Hann, ið var høgrumegin, var ránsmaður, og hann, ið var vinstrumegin, var eisini ránsmaður. So tú sært, tað eru brek og mistøk bæði til høgru og vinstru. Loysningurin hongur í miðjuni. Jesus doyði á Golgata fyri at bøta um brekini og syndirnar,

*Effie Campbell* umsetti.

---

Um tú ikki brennur fyri tí, ið tú gert, finn tær so okkurt annað, sum tú kanst brenna fyri! Stremba ikki eftir at vinna pening – stremba eftir at gera ein mun.

*e.c.* ums.

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




***Nr. 14*** ***13. juli 2014*** ***74. árg.***

# Hvat man hasin geiparin hava at siga

*Nakrir menn, sum hildu seg til hansara, tóku við trúgv. Áps. 17,34.*

Ongum okkara hevði dámt at verið róptur ein geipari ella eitt møsn, serliga ikki, um vit júst vóru í ferð við at siga frá onkrum týdningarmiklum. Men tað var júst tað, sum Paulusi var fyri, tá ið hann fyri mongum øldum síðani spákaði runt í gøtunum í Athen og tosaði við fólk.

”Geipari,” søgdu tey tá. Og onki er nýtt undir sólini. Kanska er orðalagið øðrvísi í dag, men meiningin er týðiliga tann sama.

”Tann naivi sigur, at himmalin er nakað ítøkiligt.” Soleiðis segði ein doktari í gudfrøði í einum Norðurlandi fyri nøkrum árum síðani. Vit kunna siga, at hann helt øll tey vera fávitskut, sum trúgva á Jesu uppreisn og ævigt lív sum ein ítøkiligan veruleika.

Tað var júst, tá ið Paulus varð sagdur at vera eitt møsn, at hann steig fram og helt sína kendastu talu. Hann royndi at koma áhoyrarunum á møti og byrjaði við nøkrum, sum teir kendu; men hann greiddi teimum eisini frá um Gud, um Skaparan, um Jesus, og at uppreisn av deyðum er ein veruleiki. Teir lurtaðu áhugaðir, men tá ið teir hoyrdu um uppreisn av deyðum, spottaðu summir, men summir søgdu: ”Vit vilja hoyra frá tær um hetta einaferð enn.”

Her er tað, at vegirnir skiljast.

Tað var orðið um uppreisn, sum býtti teir í Athen í tveir partar; summir valdu at trúgva, hinir rýmdu. Sama er støðan í dag. Latið okkum læra av Paulusi og óskammað boða boðskapin um uppreisnina, hvat fólk so annars rópa okkum. Trúgv okkara og menniskjunnar frelsa stendur og fellur við tí.

Tak Gud upp á orðið.

*Lat onnur siga, hvat tey vilja, ei tað sakar meg,*
*mín leið hon ber til lívsins land, har hvílu fái eg,*
*og styrki gevur Gud mær til at vinna stríðið her,*
*so spotti hvør, ið spotta vil, mín Gud mín frelsa er.*

# Jesus vísti teimum hendur sínar

*"... hann sýndi teimum hendurnar og síðuna." Jóh. 20,20.*

Dr. Paul Brand, ein framúrskarandi skurðlækni, sum arbeiddi á Christian Medical College í Vellore í India, skrivar: "Eg arbeiddi næstan hvønn dag við tí undurverkinum, sum hondin er. Men eitt tíðarskeið á hvørjum ári fekk ein serligan týdning fyri meg, og tað var, tá ið vit hildu stillu viku, eisini kallað dymbildagavikan.

Eg hugsaði um Jesu hendur. Tær hendur, sum høvdu gjørt so nógv gott, vóru onnur fyri og hin eftir gjøgnumstungnar við einum tjúkkum nagla. Teir romversku bøðlarnir kílaðu sínar naglar gjøgnum skøvningin, gjøgnum karpaltunnilin, sum rúmar eina høvuðsnerv og tær sinur, sum stýra fingrunum. Teir meiðslaðu hondina, so hon fekk skap sum ein klógv. Og Jesus fekk ikki doyving. Seinni bóru hesar hendur alla vekt hansara, so at meira vevnaður varð flensaður, og hann bløddi uppaftur meir. Hevur tú nakrantíð sæð nakað so hjálparleyst? Lærusveinarnir, sum høvdu vónað, at hann var Messias, fjaldu seg í myrkrinum og hildu seg burtur."

Men tað er ikki síðstu ferð, vit síggja Jesu hendur. Bíblian sigur: "Men tá ið komið var at kvøldi henda sama fyrsta dag í vikuni, og meðan dyrnar, har sum lærusveinarnir vóru, vóru læstar, av ótta fyri jødunum, kom Jesus og stóð mitt ímillum teirra og sigur við teir: "Friður veri við tykkum!" Og tá ið hann hevði sagt hetta, sýndi hann teimum hendurnar og síðuna. Nú vórðu lærusveinarnir glaðir, tá ið teir sóu Harran." Jóh. 20,19-20.

Dr. Brand leggur afturat: "Jesus valdi at tæna okkum til gagns gjøgnum sínar skaddu hendur. Tað er tí, at eg trúgvi, at Gud kennir okkara pínur og skilir tær. Tær oyðiløgdu hendurnar eru ein ógloymandi mynd av einari særdari mannaætt. Hann veit, hvussu lívið á jørðini er, tí hann hevur verið her og upplivað

tað. Hendur hansara prógva tað.” Kom í dag til Jesus við tínum sárum og lat hann gera teg heilan á likami, sál og anda.

”… et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

# Tríggjar systrar

*”Hann tók ilskur várar, og sjúkur várar bar hann.” Matt. 8,17.*

Eitt kvøldið, tá ið eg var á møti í Blákross Kaféini, vitnaði ein kona fyri fyrstu ferð. Beint áðrenn hon skuldi seta seg niður, segði hon: ”Eg fái hug at siga nakað afturat, eftir sum Teddy er her. Fyri nógvum árum síðani, tá ið eg var ein 7 ára gomul smágenta, var eg á møti við foreldrum mínum. Tað var Willy Hansen, sum talaði, og Teddy tolkaði.

Í dag eru vit 6 systrar, men tá vóru vit 3, og vit vóru allar við. Eg var einaferð dottin, og fallið var høgt. Tá slitnaði okkurt inni í eyga mínum. Eftir møtið bað Willy fyrst fyri mær, sum var elst av systrunum.

So bað hann fyri 5 ára gomlu miðlingasystrini. Hon var spastisk lammað og hevði aldri í lívinum gingið. Hann tók hana upp í kneppið og helt um beinið, og so bað hann. Eg veit ikki, hvussu leingi hann bað. Tað virkaði nokk so leingi. Brádliga lyfti hon lamna armin upp um høvd. Hann setti hana so niður á gólvið, og eina løtu seinni reistist hon og fór til gongu fyri fyrstu ferð í lívinum.

Síðani bað hann fyri lítlu systrini. Hon var fødd við astmabronkitis, og tað ríkti í henni, tá ið hon andaði. Hon var ógvuliga sjúk, og lítil vón var um hana. Hon bleiv grødd í stundini.” – Konan vendi sær til Teddy og spurdi: ”Minnist tú tað?”

”Ja, sera væl, sjálvt um eg bara var 23 ára gamal. Tað var sum at sløkkja eina kontakt. Fresið úr bringuni steðgaði í stundini, og pápi tín græt av gleði og rópti: Hon er frísk! Hon er frísk!”

”Ja,” tók konan uppaftur, ”og hon hevur aldri havt astmu síðani.”

”Um tveir av tykkum eru samsintir á jørðini um at biðja um okkurt, hvør søk tað so man vera, tá skal tað verða teimum givið av faðir mínum, sum er í himlunum.” Matt. 18,19.

*Effie Campbell* umsetti.

# Friður

*Hevði tú givið boðorðum mínum gætur, tá hevði friður tín verið sum flóðin og rættlæti títt sum havsins bylgjur.*
*Jes. 48,18*

Steinur, sum liggur við vegin, er altíð dustutur. Steinur, sum liggur við strondina, er altíð reinur, tí bylgjurnar skola og reinska hann.

Havið er ongantíð í friði. Bylgjurnar skvatla altíð móti strondini, upp og niður, altíð ein nýggj bylgja. Sjógvurin er flótandi og mjúkur. Og tó máar hann burtur av steinum og harðasta bergi.

Soleiðis kann rættvísi hins kristna vera. Kann altíð vera reint. Allan skitt skola bylgjurnar av. Rættvísi hins kristna er altíð nýtt. Alsamt bylgist tað fram. Rættvísi máar burtur kantarnar, enntá av harðasta sinni.

Men bylgjan hevur mikla megi og kann gerast høg sum hús, og so er hon bara ein elalítil dropi í hinum veldiga, ótømandi havinum. Rættvísi hins kristna er bara sum ein elalítil bylgjutoppur í Guds mikla náðarhavi.

Ja, Harri: eg vil halda tíni boð. Ger bara rættvísi mína sum havsins bylgjur.

*t.* týddi.

# *Brennandi kristindómur*

Vit hava nóg leingi havt ein "kristindóm light". Jesus sjálvur segði: "Eld eri eg komin at kasta á jørðina, og hvør vildi eg, at hann longu var birtur!" (Luk. 12,49) Ápostulin sigur: "Verið ikki linir í áhuga tykkara; verið brennandi í andanum; tænið Harranum." Róm. 12,11. Í Opb. 3,15-16 lesa vit um kirkjuliðið í Laodikea: "Eg veit um gerningar tínar, at tú ert hvørki kaldur ella heitur! Gævi, tú vart kaldur ella heitur! Tí, av tí at tú ert flógvur, og ert hvørki heitur ella kaldur, skal eg spýggja teg úr úr munni mínum."

*t.* týddi.

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74